# Quiz

**1** *Hvussu eitur íslendski forsætisráðharrin, sum hevur verið á vitjan í Føroyum hesa vikuna?*

**2** Kvinnuligur danskur tennisspælari hevur hesa vikuna gjørt vart við seg í US Open. *Hvussu eitur hon?*

**3** Í vikuni hevði Dimmalætting veljarakanning. *Hvør flokkur var størsti flokkur í hesi kanning?*

**4** *Hvør flokkur var í somu veljarakanning minsti flokkur?*

**5** Føroya Fiskimannafelag bleiv stovnað í 1911. Í okkara tíð hevur ein maður verið formaður í nógv ár - frá 1971 til 2007. *Hvussu eitur hann?*

**6** Í vikuni boðaði Landsverk frá sparingum. *Hvussu eitur stjórin á Landsverki?*

**7** Á aðalfundinum hjá Faroe Seafood legði nevndarformaðurin frá sær. *Hvussu eitur hann?*

**8** Hann er kendur sum vøddabyggjari og sjónleikari, men nú er Arnold Schwarzenegger politikari í USA. *Í hvørjum landi var Schwarzenegger føddur?*

**9** Kendur danskur fótbóltsspælari boðaði í vikuni frá, at hann hevði fingið krabbameini. *Hvussu eitur fyrrverandi danski fótbóltsspælarin?*

**10** Hesa vikuna verður action-filmurin SALT frumsýndur í biohøllum kring Europa. *Hvussu eitur kvinnuligi høvuðsleikarin í filminum?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veist tú alt?

**SVAR**

1. Jóhanna Sigurðardóttir, 2. Caroline Wozniacki, 3. Tjóðveldi, 4. Sjálvstýrisflokkurin, 5. Óli Jacobsen, 6. Øyvindur Brimnes, 7. Anfinn Olsen, 8. Eysturríki, 9. Brian Laudrup, 10. Angelina Jolie

**10 TING UM** Wayne Rooney

**LAGT TIL RÆTTIS:** Uni Holm Johannesen



# Fekk sáttmála sum 10 ára gamal

HANN ER FREMSTI ENSKI **FÓTBÓLTSSPÆLARIN** Í LØTUNI OG **Í ANDGLETTI** FYRI SÍTT PRIVATLÍV, MEN HVØR ER **WAYNE ROONEY?**

**1** Wayne Rooney varð føddur í býarpatinum Croxteth í Liverpool hin 24. oktober í 1985.

**2** Foreldrini eru Thomas Wayne og Jeanette Marie Rooney, sum hava ættarbond úr Írlandi.

**3** Hansara stóra fyrimynd er Ducan Ferguson, sum var framherji hjá Everton í 90-árunum.

**4** Wayne Rooney fekk ungdómssáttmála við Everton, tá hann var 10 ára gamal.

**5** Hin 19. oktober í 2002, fimm dagar áðrenn sín 17 ára føðingardag, stóð Rooney fyri sigursmálinum, tá Everton vann 2-1 á heimavølli móti Arsenal, sum ikki hevði tapt í seinastu 30 landskappingardystunum.

**6** Manchester United gav Everton heili 25,6 millióónir pund fyri framherjan. Newcastle United var nær við at fara knýta Rooney at hópinum fyri 18.5 milliónir pund, men hann valdi Manchester United í seinastu løtu

**7** Rooney skeyt trý mál og legði upp til eitt, tá hann fyrstu ferð spældi í reyðu troyggjuni hjá Manchester United. Enska stórfelagið vann 6-2 á Fenerbache í Champions League hendan dagin.

**8** Rooney hevur tveir yngri beiggjar – Graeme og John. John Rooney, sum eisini er framherji, er 20 ára gamal og varð leingi knýttur at ungdómsdeildini hjá Everton, áðrenn hann skifti til Macclesfield í 2008, sum spældi í triðbestu ensku deildini. Hann skifti í summar til Portland Timbers, sum spælir í næstbestu deildini í USA. Graeme spælur ikki stórvegis fótbólt – hann hevur hinvegin roynt seg sum sjónleikara.

**9** TaWayne Rooney fann sær Coleen Rooney í 2004. Tey giftust hin 12. juni í 2008.

**10** Wayne Rooey er 24 ára gamal í dag. Hann hevur longu givið tvær sjálvævissøgur út – »My Story So Far« og »The Official Wayne Rooney Annual«.

**SITAT**



Um tú vilt liva eitt lukkuligt lív, knýt so lívið at einum máli – ikki at fólki ella lutum.

***Albert Einstein***